Sjúkrabilarnir skulu verða í Vágum

Vágatingmenninir eru sera avgjørdir í síni søk. Teir góðtaka als ikki, at sjúkraflutningstænastan verður flutt úr Vágum til Havnar

SJÚKRAFLUTNINGUR
Edvard Joensen

Vágar:
Vágatingmenninir hava tosað saman og eru á einum máli um, at teir góðtaka ikki, at sjúkrabilarnir verða fluttir til Havnar at hava stað.

Sjúkrabilførararnir í Vágum hava boðað frá, at fáa teir ikki eina vaktarskipan, teir kunnu góðtaka, leggja teir arbeiðið niður tann 30. apríl. Teir hava í seks ár ella so roynt at fa eina skipan, sum gevur teimum samsýning fyri ta tiðina, teir ganga vakt, men hava einki fingið burturúr. Nú hava teir mist tolið, siga teir í brævi, sum sent er avvarðandi myndugleikum.

Men nú skal nakað henda, lova so teir, sum ábyrgdina hava. Tað vil siga landsstýrismaðurin við heilsumálum, eins og tingmenninir í Vágum, ið eisini vóru tingmenn tær báðar seinastu seturnar, nú eru komnir inn í málið.

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður í Vágum, er formaður í Trivnaðarnevndini hjá Løgtinginum. hann væntar ongan trupulleika av at finna peningin til vaktarskipanina hjá sjúkrabilførarunum í Vágum

Øgiliga neyðugt

Marjus dam, sambandsløgtingsmaður úr Vágum, er eisini kommunulækni í oynni.

Hann staðfestir, at tað er øgiliga neyðugt at hava sjúkraflutningstænastuna við stað í oynni. Skjót hjálp er góð hjálp, veit læknin, og tað kann í ávísum førum bjarga lívi, at bilurin er á staðnum tann hálva tíman fyrr, sum tað annars tekur at koyra úr Havn og vestur í Vágar, áðrenn síðan skal farast aftur til Havnar á sjúkrahús. Tað ræður altíð um at hava so stutta »transporttíð« sum gjørligt, vísir Marjus Dam á.

Vágar eru øki, har nógv fólk samlast. Hugsað verður sjálvandi um flogvøllin. Og tá nógv fólk eru saman, er eisini møguleikin fyri einumhvørjum hóttafalli tilsvarandi stórur. So sannlíki fyri at noyðast at brúka sjúrkabilar í Vágum er størri enn fólkatalið, sum skrásett er í kommununum í oynni, vísir. Fólki kann altíð bráddliga bila eitthvørt, og tá kann vera gott at hava hjálpina á staðnum. Bilarnir hava góða útgerð, og fólkið, sum koyrir teir, er útbúgvið til at brúka hesa útgerð.

Menninir, sum í áravís á sjálvbodnum grundarlagi í Bjargingarfelagnum hava koyrt bialrnar, hava gjørt eitt risaarbeiði, sigur Marjus Dam, kommunulækni. Vera bilarnir flutti til at hava stød í Havn, verður øll tilbúgvingarætlanin, teir eru partur av, torpederað, sigur hann.

Ikki upp á tal

So skiftir Marjus Dam kaskett. Gerst løgtingsmaður og verður bragdligari og títtari í orðalagi.

Tað kemur yvirhøvur ikki upp á tal at flyta bilarnar úr Vágum, staðfestir hann.

– Eg vil stríðast og strevast til síðsta blóðsdropa, fyri hesum málinum. Og tað skuldi ikki verið tann stóri trupulleikin at fingið hetta at borið til, tí talan er ikki um teir stóru pengarnar. Einar tvær milliardir er ramman á figgjarlógini, so hesa hálvu miliiónina eiga vit at finna, sigur hann.

Bilarnir hava havt stød í Vágum síðan einaferð í sekstiárunum. Og sjálvt í ringastu kreppuni í nítiárunum bar til at hava teir her. Tí dugi eg ikki at síggja nakra grund til, at tað ikki skal bera til at finna figging til hetta ynski hjá førarunum.

Og uppgávur eru fleiri til teirra eisini, visir hann á. Til dømis kundu teir havt um hendi sjúkrafutningin til og av flogvøllinum við sjúklingum, sum skulu uttanlands til viðgerðar.

Marjus Dam sær onga skilagóða orsøk til at leggja skipanina við sjúkrabilunum í Vágum niður. Flutningurin skal røkjast, og verður tað ikki hiðani, verður tað bara onkra aðrastaðni frá, tað verður gjørt. Tað kostar eisini pengar.

Munurin verður bara, at vágafólk fara at kenna seg tað óryggari. Og trygdini hjá fólki slaka vit ikki við, sigur Marjus Dam.

Vit finna penignin

Hin vágatingmaðurin, fólkafloksmaðurin Jørgen Niclasen, er ikki í iva um, at peningurin til vaktarskipanina verður funnin. Hann vísir esini til tær tvær milliardirnar, sum ramman er.

– Hendan tænasta er líka neyðug fyri Vágar, sum sjúkrahúsini eru fyri Norðoyar og Suðuroy, sigur hann. Tað væntar hann eisini, at tingmenn fara at skilja, tá málið kemur so langt.

Jørgen Niclasen er formaður í Trivnaðarnevndini í Løgtinginum, og har væntar hann at fáa ávirkan, tá málið í figgjarlógarviðgerðini umvegis Figgjarnevndina kemur til Trivnaðarnevndina til ummælis. Pengarnar verður eingin trupulleiki at finna innan karmin heilsumál, sigur hann.

Hann sigur, at hann, eins og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fyrr hevur sagt við Sosialin, hellir til Eysturoyarmodellið við einum portørliði, sum hevur vakt og so gongur í eini turnusrundu, har teir av og á eru á Landssjúrkahúsinum.

Jørgen Niclasen væntar, at sjúkrabilførararnir í Vágum, sum hava verið so tolnir, eisini fara at bíða nakrar dagar eftir 30. apríl, til figgjarlógin er samtykt. Tað verður helst einaferð í fyrru helvt av mai. Og tá skuldi hetta málið verið loyst, væntar hann.

Sjúkrabilarnir í Vágum kundu eitt nú havt flutningin við sjúklingum til og av flogvøllinum at røkt, sigur Marjus Dam, kommunulækni og løgtingsmaður í Vágum

Bíðar eftir mótpartinum

Sakførarin hjá partafelagnum Nakki bíðar nú eftir, um Fiskimálaráðið fer at kæra dómin í Jógvan S málinum

DÓMURIN

–Rætturin hevur talað, og niðurstøðan er sólarklár. Nú bíða vit bara efir, hvat Fiskimálaráðið fer at gera, áðrenn vit fara at rokna út, hvussu stórt endurgjaldskrav vit fara at seta fram, sigur Jógvan Páll Lassen, sakførari hjá reiðarínum hjá Jógvani S.

Partarnir hava tvær vikur at umráða seg í, og til ta verður friður, sigur hann.

ej

2 ára fongsulsrevsing fyri siðamisbrot

Ein maður síðst í sekstiárunum bleiv í Føroya Rætti mikudagin dømdur tvey ára fongsulsrevsing fyri siðamisbrot móti abbadóttur síni

RÆTTARMÁL
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Mikudagin fall dómur í einum tí størsta málinum um siðamisbrot í føroyskari rættarsøgu. Ein maður síðst í sekstiárunum bleiv dømdur tvey ára fongsulsrevsing fyri at hava gjørt seg inn á eina abbadóttur. Misbrotini vóru framd í einum tíðarskeiði upp á sjey ár, frá tí at gentan var seks ára gomul og fram til, at hon var trettan ár.

Sannførandi frágreiðing frá gentuni

Eftir at hava lisið dómin upp, segði dómarin í Føroya Rætti, at hann hevði tikið atlit til, at gentan var so ung, tá tey flestu misbrotini vóru framd, og tað hevði verið við til at skerpa dómin. Hinvegin so hevði aldurin hjá manninum eisini talað til hansara fyrimuns í sambandi við dómin. Dómarin grundaði dómin á, at frágreiðingin hjá gentuni hevði verið ógvuliga nágreinilig og sannførandi. Somuleiðis helt dómarin ikki, at tað var nakað óvanligt í, at eingin í nærumhvørvinum hjá manninum og gentuni hevði lagt merki til nakað, og at gentan einki hevði sagt fyri nøkrum, tí tað var ógvuliga vanligt í slíkum málum, at eingin veit av nøkrum. Harafturat helt dómarin ikki, at nakrar av ákærunum vóru ov gamlar. Siðamisbrotini fóru fram í einum sjey ára tíðarskeiði frá 1992 til 1999, tá ið gentan var 13 ár. Umframt fongsulsrevsingina skal maðurin gjalda abbadóttrini 30.000 krónur, og somuleiðis skal hann gjalda allan sakarmálskostnaðin, okkurt um 25.000 krónur. Hetta er, sum áðurnevnt, eitt tað størsta sakarmálið av sínum slag í Føroyum, og Føroya Rættur nýtti tríggjar dagar til viðgerð av málinum. Málið hevur koyrt fyri afturlatnum hurðum í Føroya Rætti.

Ikki beint inn at sita

Eftir at dómur var sagdur, bað verjin hjá ákærda, Christian Andreasen, í samráð við ákærda um umhugsunartíð til møguligani at skjóta dómin inn fyri landsrættin. Ákærimyndugleikin kravdi, at ákærdi bleiv varðhaldasfongslaður beinan vegin, tí ákærin metti, at talan var um so mikið umfatandi dóm, at rættast var at varðhaldsfongsla mannin beinan vegin. Eisini helt ákærin, at av tí at ákærdi kemur úr einum minni bygdarsamfelag, hevði rættast verið mótvegis familjuni hjá gentuni og fólk annars í viðkomandi bygdarsamfelag, at rættast var, um maðurin fór beint inn at sita. Hetta sýtti Føroya Rættur tó fyri við teirri grundgeving, at ákærdi er komin so mikið til aldurs, at fongslingin óivað hevur stóra ávirkan á heilsustøðuna hjá manninum.

Gamla Norrøna er seld

Tað er OM Ships International, ein kristin felagsskapur, sum hevur keypt gomlu Norrønu frá Smyril Line fyri 3,6 milliónir evrur. Skipið fer nú at eita Logos Hope, og siglingin fer at byrja um eitt ár ella so

SKIPASØLA
Hans Kárason Mikkelsen
mikkels@fas.harvard.edu

Skipið var selt mikudagin tann 31. mars eftir drúgvar royndir frá Smyril Line at fáa skipið selt. Felagið hevur nevniliga seinna árið roynt at sloppið sær av við Norrønu I, men striltið gekst, inntil trúboðanarfelagsskapurin OM keypti skipið gjøgnum OM Ships International.

Norrøna I, sum er góð 30 ára gomul, varð bygd í Rendsburg, og Smyril Line hevur havt skipið seinnu 20 árini, har tað hevur rikið føstu rutuna í Norðuratlantshavinum.

Men nú eru dagarnir hjá Norrønu I sum ferðamannaskip taldir, tí nú verður hon umgjørd til trúboðaraskip við alskyns útgerð umborð. Serliga verður dentur lagdur á ljós og ljóð í umvælingini, og ein stórur bókahandil verður umborð, sum fer at verða tann størsti flótandi bókahandilin í heiminum.

Kømur verða eisini gjørd í stand umborð á gomlu Norrønu, sum fer at hava 350 starvsfólk og pláss fyri 150 vitjandi. Møguleiki verður eisini fyri airkondition, internetsambandi, og telefon.

Leiðarin av OM í Danmark, Bitten Schriver, sigur um keypið av skipinum og umvælingina, at tað hevði ikki borið til uttan tann stuðulin, sum felagsskapurin hevur fingið.

– Vit vórðu ordiliga tikin av bóli av øllum tí peningaliga studningi, sum fólk kring heimin hava givið til hetta endamálið, sigur Bitten Schriver.

Gamla Norrøna er í løtuni í Keypmannahavn, og hon fer væntandi í sigling í 2005.

Gamla Norrøna er seld til kristna felagsskapin OM

Frits í Listaskálanum

LISTAFRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Fríggjadagin 2. apríl kl. 16:00 verður málningaframsýning hjá Frits Johannesen latin upp í Listaskálanum. Til skjals verða 30 listaverk, sum eru málað í ár og í fjør. Framsýningin er opin til sunnudagin 16. mai. Myndirnar eru úr hugaheimi listamansins í tónleiki og hálvum skjøldrum, sum bylgjast við garðalið, kirkjuskjøldrar og hálv hjól í litføgrum spæli.



Krím herjar landið

Kommunulæknar kring landið hava seinnu tíðina sæð eitt hægri tal av fólki, sum ganga við ringum og drúgvum krími. Tað eru serliga smærri børn, sum verða sjúk

SJÚKA
Hans Kárason Mikkelsen
mikkels@fas.harvard.edu

Magnus á Stongun, kommunulækni á Eiði, sigur, at tað er eitt sokallað várkrím, som gongur í løtuni.

– Tað er ikki talan um influensu, men eitt vanligt várkrím, sum kanska er verri enn tey, sum plaga at vera hesa árstíðina, sigur kommunulæknin Magnus á Stongun.

Tað eru mest børn, sum leggjast inni við millumoyra betendilsi og tílíkum. Ikki eru tað nógv vaksin, sum verða sjúk, men summi fáa influensulíknandi sjúkueyðkenni.

Pól Jóhannes í Horni, kommunulækni í Fuglafirði, sigur, at hetta er ikki meira enn vanligt. Og tó, so verður okkurt smábarnið innlagt.

– Tey hosta so mikið illa, at tey missa ondina, sigur Pól Jóhannes, kommunulækni.

– Men annars er onki nýtt at síggja, sigur Magnus á Stongun, kommunulækni á Eiði.